# VIKULIÐIÐ

vodafone deildin VIKA 33

*Ítróttarredaktiónin úttekur Vikuliðið, og eru leikarans avrik mett út frá øllum Vodafone-dystum í farnu viku.*




Uppstilling: **3-4-3**

## Vodafone

**20-08-2010:**

**NSÍ-EB/S:** 18:30 Dómari:Petrur Reinert

**22-08-2010:**

**VÍK-B71:** 15.00: **Dómari** Bárður Mortensen
**HB-B68:** 15.00: **Dómari** Mattias Nyman
**FC S-B36:** 14.45: **Dómari** Lars Múller Thorvald Petersen Vinjard Dam Jens P.
**AB-ÍF:** 15.00: **Dómarin** Petur Reinert

## 1. Deild *kvinnur*

**22-08-2010:**

**KÍ-Skála:** 14.00: **Dómari:** Elsa Andreasen
**AB-Víkingur:** 12.30: **Dómari:** Ríkin Djurhuus
**MB-EB/Str.:** 15.00: **Dómari:** Fróði Poulsen

## 1. Deild *menn*

**21-08-2010:**

**Víkingur-07 Vestur:** 15.00: **Dómari:** Alex Troleis
**B68-KÍ:** 15.00: **Dómari:** Rói Jacobsen
**NSÍ-TB:** 15.00: **Dómari:** Petur Reinert
**FC Hoyvík-HB:** 16.00: **Dómari:** Páll Augustinisen
**AB-EB/Streymur:** 16.30: **Dómari:** Dia Lanhauge

## Faðir og synir skulu døma dyst

Tá unglingarnir hjá B36 og ÍF spæla landskappingardyst tann 29. august verður talan um eina ógvuliga serstaka hending

Landskappingardysturin í unglingadeildini millum B36 og ÍF, sunnudagin 29. august verður meir enn bara ein vanligur landskappingardystur í unglingadeildini.

Dysturin fer nevnliga at verða dømdur av pápa og synum. Høvuðsdómari verður okkara fyrsti altjóða dómari, Nemus Napoleon Djurhuus. Hjálpardómarar verða Ransin Napoleon Djurhuus og Ríkin Napoleon Djurhuus, og verður soleiðis ein sterkur fótbóltssøguligur dámur til unglingadystin millum B36 og ÌF, sum verður spældur um 12 dagar.

Bæði Ransin og Ríkin fylgja í fótasporum pápa síns, og eru dómarar í bestu og næstbestu fótbóltsdeildini.

## Virgar Hvidbro settur í starv sum aðalskrivari

Fótbóltssamband Føroya hevur sett Virgar Hvidbro sum aðalskrivara frá 1. september 2010. Virgar hevur verið virkandi aðalskrivari seinastu 10 mánaðirnar.

Starvið sum aðalskrivari var í juli lýst leyst, og 16 umsøkjarar søktu starvið. Starvsnevndin hjá FSF hevur viðgjørt allar umsóknirnar, og hevur nú tikið avgerð um at seta Virgar Hvidbro sum aðalskrivara.

Virgar Hvidbro er 42 ára gamal og hevur starvast hjá FSF síðani 2001.

- Virgar hevur hollar royndir í FSF, og hann hevur verið virkandi aðalskrivari seinasta tíðina. Hann hevur hesa tíðina víst ans fyri, hvat tænar felagsskapinum best. Hann hevur evnini at standa fram, og hann dugir væl at umboða FSF í øllum viðurskiftum. Starvsnevndin fegnast um, at málið um aðalskrivaran nú er avgreitt, soleiðis at nevndin saman við aðalskrivaranum kann fara undir at fremja neyðugar tillagingar innan FSF, sigur Christian Andreasen, forseti í FSF.

*(www.fsf.fo)*


Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu

FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir

## *Hjálparfólki til breyðsøludeildina*

at byrja skjótast til ber



Vit sóknast eftir einum røskum fólki, við góðum røkiskapi og áræði, til fast starv í einum handli, sum lív altíð er í.

**Arbeiðsuppgávur:**
At røkja starvið sum hjálparfólk í breyðsøludeild okkara.

**Arbeiðstíð:**
Um 30 tímar um vikuna, (3/4 tíð), harav annan hvønn hósdag fyrrapart og annan hvønn leygardag fyrrapart

Vit rokna við, at tú ert:
- Røkin, álítandi og fleksibul
- Blíðlig/ur av lyndi
- Trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum

**Løn:**
Smbrt. S & K sáttmálanum

Send okkum nøkur orð um teg sjálva/n til:

Keypssamtøkan
í Dr. Jakobsensgøtu
Postsmoga 349
FO-110 Tórshavn
Tel 31 13 20

Att.: Bogi Vík, tel 228222